umhvørvisstovan

SJÓVAR KOMMUNA
SKÚLAVEGUR 10
490 STRENDUR
FØROYAR

Argir hin 22. november 2011
Málsnr.: 11/00016-11
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Spillivatnsætlan góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 22.11.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Sjóvar kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

## 1. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 31.12.2010 spillivatnsætlanina til góðkenningar (mál nr. 11/00016-1), og er ætlanin gjørd av Sp/f Munin og Sp/f Martin E. Leo, ráðgevandi verkfrøðingum. Í samband við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan verið í samband við Sp/f Munin, og tann 26.08.2011 fekk Umhvørvisstovan eina dagførda ætlan (mál nr. 11/00016-9).

Sjóvar kommuna hevur á bygdaráðsfundi tann góðkent ætlanina, ið Sp/f Munin og Sp/f Martin E. Leo hava gjørt (mál nr. 11/00016-10)

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í dagførdu ætlanini (mál nr. 11/00016-9), verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn. Hetta merkir, at spillivatnsætlanin m.a. fevnir um spillivatn frá øllum húsarhaldum, virkjum og virksemi í kommununi, og at spillivatnið eftir reinsing verður leitt gjøgnum lokaða skipan beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørivsliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensionering o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10 stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

## 2. Kunngerð og kæra

Góðkenningin av spillivatnsætlanini verður lýst á heimasíðu okkara og við almennari lýsing, har tað eisini verður kunnað um at góðkenningin, sambært § 60, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum innan 4 vikur frá at góðkenningin er alment kunngjørd.

Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur týðandi persónligan týdning fyri.

Suni Petersen, settur deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Sp/f Munin, Dalastígur 7, Tórshavn
Sp/f Martin E. Leo, Tórsgøta 24, Tórshavn